# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
✓ lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

## Akfør

**BAGASJUBERARI**
til Fiat Uno SX ynskist til keyps.
Tlf. 316274

**BENSINTANGI**
Bensintangi til BMW 325i til sølu. Prísur 350 kr.
Tlf 214470 e. kl. 15:30

**BILAR TIL SØLU**
Daihatsu Charmant árg. 88 og Toyota Hiace árg. 86 við motorbrekum til sølu.
Tlf. 215140

**BÍLIGA TIL SØLU ELLA LEIGU**
Sprite Alpina eginvekt 550 kg totalvekt 775 kg. Kampingvognurin hevur gaskomfýr, vask við pumpu og turt wc, køliskáp til gas ella 220w, radio fm, am, lm og bandavspælara + hátalrar. Vognurin hevur tveir benkur aftan + borð og borðplátan kann leggjast niður í millum og meiri soviplásss. Framman eru tveir stuttir benkur + borð og plátan kann eisini leggjast niður í millum. Vognurin hevur innlagt el 220w.
Tlf. 312604/212504

**BILUR YNSKIST**
Er nakar, ið hevur ein lítið brúktan, rímuligan stóran diesel bil at selja mær? Prísur max. 110.000 kr.
Tlf. 443320, e. kl. 17

**BMW 518 TIL SØLU**
Nýsýnaður og í góðum standi.
Tlf. 315419, e. kl. 18

**CITROËN 3X19 TRS**
stationcar, árg. 87, til sølu fyri 28.000 kr. Koyrt 157.000 km. Í besta standi.
Tlf. 314107

**DAIHATSU ROCKY 4X4**
jeepur, turbo diesel, til sølu. Mekaniskt í góðum standi. Árg. 86. Prísuppskot 15.000 kr.
Tlf. 444785

**DAIHATSUN ROCKY**
turbo diesel, árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 443227

**DAIWOOD LAGANZA 2.0**
Vegna keyp av arbeiðsbili, er ein 13 mör. gamal Laganza (svartur) bíliga til sølu. Bilurin hevur CD-spælara, aircon., sportsfelgur, bert koyrt 4950 km.
Tlf. 213060

**DEKK TIL JEEP**
Fýra summardekk av slagnum Dunlop 10R15 við hvítum felgum til sølu fyri 5.000 kr. Dekkini eru lítið og einki brúkt. Nýprísur 7.000 kr.
Tlf. 448290, e. kl. 18

**EYKALUTIR**
til Ford Sierra 1,6 frá 1986, m.a. góður motorur, nýggjur forrútur, næstan nýtt útstoyt, píkadekk á felgum, hurðar, setur o.a.
Tlf. 313133

**FORD ESCORT 1.8**
til sølu. Fýra ára gamal, væl viðfarin, við eykaútgerð.
Tlf. 317583

**GÓÐ PÍKADEKK**
Góð píkadekk 155-R13 á Golf felgum og fýra góð summardekk 155-R13 til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 214470 eftir kl. 15:30

**HONDA ACCORD 2.0**
árg. 87, til sølu. Hevur powerstýring, el-rútar, sentrallás, koyrt 124.000 km, hevur Kennwood anlegg og Kenwood hátalarar + subwoofara.
Tlf. 217218 - 457218

**HONDA CB 500**
sport, árg. 9/99, km 1800 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 212525 og 221232

**MAZDA 323 TIL SØLU**
Mazda 323, 1500 GLX, árg. 88.
Tlf. 222794

**MAZDA 626**
árg. 87, til sølu.
Tlf. 316916

**MAZDA 626**
gráur, árg. 85, til sølu.
Tlf. 441974 - 442104 ella 211965

**NISSAN BLUEBIRD 2000**
T12, árg. 89, til sølu.
Tlf. 444069

**NISSAN PATROL**
3.3 turbo, árg. 87, til sølu. Fýra nýggj dekk fylgja við (setur). Stutta modellið.
Tlf. 452101 - 220448

**NISSAN PATROL**
longra modellið frá 12/85, við setrum aftan, til sølu. Kostnaður 20.000 kr.
Tlf. 321516

**OPEL KADETT 1,6 S**
nýsýnaður, til sølu fyri 24.000 kr.
Tlf. 444140

**OPEL KADETT 2.0 GSI**
árg. 89, bilurin er svartur, hevur 137 HK, digitalt instrumentbretti, sportsfelgur, tuningsútstoyt, sóltak, sportsetur, senkaður. Sýnaður í februar 2000. Til sølu fyri 50.000 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 217219 - 212220

**SCANIA**
82 m, til sølu.
Tlf. 221580

**TIL SØLU**
Ein Volvo 244 6 cyl. diesel, árg. 79, bíliga til sølu.
Tlf. 447440

**TIL SØLU**
Ferrari GR 2300 S krani til sølu.
Tlf. 449045, e. kl. 17
Tlf. 283753

**TIL SØLU**
3 hurðaður Mazda 323 2,0 diesel, 19 mör. gamal, til sølu. Hevur orig. tokulyktir, cd-spælara, sportsfelgur og píkadekk á felgum.
Tlf. 441793 - 222160

**TIL SØLU**
Toyota Carina E 2.0 GLi, árg. 93, í sera góðum standi, nýlakeraður, aut. gear, el-rútar, el-spegl, servostýring, sportsfelgur við nýggjum dekkum.
Tlf. 222016

**TIL SØLU**
Ein Sprite campingvognur við fortelti bíliga til sølu.
Tlf. 212200

**TIL SØLU**
Lítið brúkt summardekk, Bridgestone Potenza RE 720, koyrt 6.000 km, til sølu.
Tlf. 210664

**TIL SØLU**
Mitsubishi L200 turbo diesel 25 4x4, til sølu. Sera væl viðfarin. Árg. 96.
Tlf. 375235 - 375433

**TIL SØLU**
Bláur Opel Kadett, árg 86. Ein eigari. Bíliga til sølu.
Tlf. 371238.

**TIL SØLU**
Skoda Felicia 1,6 GLX, árg. 1/97, koyrt 50.000 km, til sølu fyri 70.000 kr.
Tlf. 421277
ella 221683

**TIL SØLU**
Toyota Carina II við 15" sportsfelgum, senkaður, spoylarar, 2,0 GLI, 125 HK, aut. gear, eyka fjaðrar, koyrt 170.000 km, hvítur, sær gott út.
Tlf. 220979

**TIL SØLU**
Renault Megane RL 1.4e, 9/98, til sølu.
Tlf. 456731

**TIL SØLU**
Ein Datsun 2000 GLX til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 212200

**TIL SØLU**
Ford Escort frá 86. Bjálkin framman farin, annars góður. Kostnaður 3.000 kr.
Tlf. 314995, e. kl. 18

**TIL SØLU**
Nissan Patrol 3,3 TD, reyður, árg. 86, koyrt 260.000 km/t, til sølu fyri 15.000 kr. P.S. Mekaniskt umveldur.
Tlf. 220979

**TIL SØLU**
Nýggjur kølari til Mitsubishi Lancer 1500 GLX, árg. 86, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 221060

**TIL SØLU**
Opel Astra 1,6 GLS, árg. 94, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 333574
- 221128

**TOYOTA CARINA 1,6 DX**
koyrt 166.000 km, árg. 87, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 312669
Mobil: 222219

**TOYOTA CARINA 2**
til sølu. Árg. 89, er vælhildin og í sera góðum standi.
Tlf. 221049 ella 321549, eftir kl. 17

**TOYOTA CARINA E 2.0**
diesel, árg. 5/96, sýnaður 12.99, til sølu.
Tlf. heima 319961
tlf. arb. 313599 lok. 28
Spyr eftir Bergi

**TOYOTA COROLLA 1.6**
árg. 86, til sølu fyri 5.500 kr. Bert koyrt 154.000 km.
Tlf. 316278, e. kl. 17

**VOLVO 340 DIESEL**
Árg. 87, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 373314

**VOLVO F6 LASTBILUR**
við kassa og lift til sølu.
Tlf. 218811

**VW POLO**
árg. 87, til sølu fyri 4.000,-
Tlf. 310141

**BILAR TIL SØLU**
Ein Nissan Micra og ein Daihatsu Charmant, í góðum standi. Teir eru frá 1987.
Tlf. 281724

## Amboð

**BLANDIMASKINUR**
Týskar kvalitets blandimaskinur fáast til keyps hjá:
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

**BOB CAT GRAVMASKINUR Á BELTUM**
1500 - 5000 kg. Nýggjar og brúktar! Kvalitetur, motorkraft & útgerð!
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

**MJÓLKATANGI**
Mjólkatangi til sølu, røka 1000 ltr.
Tlf. 219494

**SLÁIMASKINA TIL TRAKTOR**
Rotor sláimaskina til traktor til sølu, slag: JF 1900cm við stengulknekkara og leggur í rygg. Einans brúkt eitt summar. Nýprísur í Danmark 37.000, selist fyri einans 10.000 kr.
Tlf. 211665

**SØKIST**
Lítil gravimaskina søkist, helst við beltum, til leigu ella bíliga til keyps.
Tlf. 447181, fax 448854

**TIL SØLU**
Senko seympistól til sølu.
Tlf. 317565 ella 311950

**TRANSWORDK-KRANI**
2 tons, longd ca. 17 m, breidd ca. 6 m, til sølu.
Tlf. 218811

## Arbeiði

**ARBEIÐI SØKIST!**
Eg eri ein 16 ára gomul genta, ið søki arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 222007, spyr eftir Eyðbjørg

**FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI**
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

**SØKT VERÐUR EFTIR**
timburmonnum til arbeiði í Danmark. Góð løn verður givin.
Tlf. 0045 20440049 ella 371926

**TILBOÐ YNSKIST**
at skifta takið á einum húsum og gera ein kvist.
Tlf. 313799

## Barnaútgerð

**BRIO BARNAVOGNUR**
Leðurlook, 90x34 cm liggipláss, 2 ára gamal, væl viðfarin og í fínasta standi, bara brúktur til eitt barn. Prísuppskot 3.000 kr.
Tlf. 319897 (aftan á kl. 18)

**FLOTTUR BARNAVOGNUR TIL SØLU**
Svartur leðurlook við svørtum stelli og krom hjólum, bert brúktur til eitt barn. Prísuppskot 1.700 kr.
Tlf. 310644

**KVØLDSKÚLI OG BARNAANSING**
Kundi tú hugsað tær at gingið á kvøldskúla í Havn komandi vetur, so er hetta kanska nakað fyri teg. Eftir summarfrítíðina hava vit brúk fyri, at tú passar tvey systkin uppá 2 og 4 ár 20 tímar um vikuna. Tú kanst búgva hjá okkum teir dagarnar tú ert í skúla og fáa eina samsýning fyri barnaansing.
Tlf. 315503 og 212491

**SKÓTARYGGSEKKUR**
til sølu fyri 800 kr ella harum. Bara brúktur ta einu ferðina!
Tlf. 319 897 (eftir kl. 18)

**TIL SØLU**
Silvercross babylift við stálsíðum, lítið brúkt, 500 kr. Nýprísur 1.000 kr. Bilstólur upp til 13 kg, 300 kr.
Tlf. 312729, e. kl. 17

**TIL SØLU**
Weekendsong við madrassu til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 316016

**TIL SØLU**
Myrkabláur Brio barnavognur við babylift til sølu.
Tlf. 316212

**TIL SØLU**
Pusliborð/baðikar við kommodu til sølu fyri 500 kr. Nýprísur 800 kr. Bert 3 mør. gamalt.
Tlf. 310960

**TVÍBURÐASTÓLUR**
av merkinum Brio Duette, til sølu.
Tlf. 312075
ella 213081

**TVÍBURÐAVOGNUR**
sum kann kombinerast, til sølu fyri 4.000 kr. Onnur barnaútgerð selist eisini.
Tlf. 318476

**ØNSKES**
(lán, leje eller køb)
Til vores barnebarn, der kommer på ferie, mangler vi: barnevogn, weekendseng, høj stol og autostol + evt. gitter til trappe.
Tlf. 314531

## Barnaansing

**GENTA SØKIST**
at ansa eftir 7 mør. gomlu Siju.
Tlf. 312239

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Bræveskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út- & sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ..... |

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki



**GENTA SØKIST!**
Genta søkist at ansa 1/2 ára gamlari gentu heima hjá okkum uml. 6-8 dagar um mánaðan frá 01. sept. Foreldrini arbeiða í skiftisvaktum.
Tlf. 319265

## Bátaútgerð

**YANMAR BÁTA-MOTORAR**
-frá 9 HK til 420 HK.
Vit selja og umvæla Yanmar bátamotorar.
Tosið við okkum og fá eitt gott tilboð
THOMAS DAM amboð & maskinur
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38

**8-MANNAFAR GLASFIPUR**
til sølu. Bygt í Bø. 45 HK motor, radara, ekkolodd, kortplottara, sjálvstýrara, VHF, gummibát, oljutrýst spæl og snellir.
Tlf. 319536 ella 219536
eftir kl. 17

**REYÐ ÁR**
við hvítum blaði mist undir kappsigling á Skálafirði. Finnur nakar hana, so ring
Tlf. 319080 ella 317542,
eftir kl. 17

**TIL SØLU**
15 HK Mariner páhangsmotorur til sølu.
Tlf. 212422

**TIL SØLU**
20 HK Mercury páhangsmotorur til sølu.
Tlf. 212789

**TIL SØLU**
15 t. deksbátur við fiskiloyvi 4 A, til sølu um hóskandi boð fæst. Krevur ábøtur.
Tlf. 441760, e. kl. 18

**YNSKIST**
Glastrevjabátur ynskist til keyps. Uml. 27-30 føtur við vanligari útgerð.
Tlf. 448573

## Bingo

**GOTT BINGO**
verður í Eydnuni sunnudagin 2. juli kl. 16. Full pláta 400 kr. Tó 6. og 12. spæl 600 kr. Á lutaseðli 2.000 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag og Flogbóltsfelagið Nøvan

**GOTT BINGO**
verður í Ólastovu leygardagin 24. juni kl. 17. 500 kr. til fulla plátu. Á lutaseðlunum m.a. gávukort á 100, 200, 300, 400 og 500 kr. Fleiri turr tjógv og bógvar, og eitt 21" sjónvarp, virði 5.300 kr.
Lymfødemfelagið

**KÍ-BINGO**
verður í Skálanum hósdagin 29. juni kl. 19.30. Eykaspælið heldur fram.
KÍ

## Burturm. / funnið

**TÚ, IÐ FÓR AVSTAÐ VIÐ**
mínum nýggja svarta Anorakki úr KI-høllini á Norðoyarstevnu, verður biðin um at lata meg fáa hann aftur beinanvegin!!!
Tlf. 316125
eftir kl. 16.00

**BURTURMIST**
Jojo's burturblivnir á Eystanstevnu. Eg misti mítt runda Jojo's hylki, við Jojo's figurum í, á Eystanstevnu leygardagin. Tað er uml. 20 cm. langt og hevur áskriftina Bone Head Caddy. Eg vildi verið ótrúliga fegin, um finnarin vildi sent mær hylkið. Eg lati finningarløn og góðgeri fyri porto. Ella ring.
Óliver, 7 ár
Fugloyarvegur 13b, 100 Tórshavn
Tlf. 319721

**LÍTIL LEÐURPUNGUR**
Lítil ljósabrúnur leðurpungur funnin uttanfyri Skemmuna mikud. 14.6. við 340,- kr. í. Eigarin kann ringja til okkum eftir kl. 16. (Eitt merki er í).
Tlf. 311919

**OLYMPUS FOTOTÓL**
í svartari mappu, funnið 19.5.2000 í Saltnesi.
Tlf. 447275

## Býli

**»GULA HÚSIÐ« Í MYKINESI**
vælegnað til bólkar eins og einstaklingar. Allir hentleikar í húsinum.
Tlf. 332614
ella 318468

**2 VER. ÍBÚÐ Í KBH TIL LEIGU**
í tíðarskeiðnum 9.–24. juli og frá 15. aug–3. sept. Liggur sera sentralt, bert 10 min. til gongu til Strøget, Hovedbanegården, Tivoli v.m. Íbúðin hevur allar hentleikar so sum køk, wc v/ bað, kamar, stovu v/ sjónvarpi o.ø. Kostnaður 1.500 kr. pr. viku.
Tlf. 0045 32961082

**FERÐIST Í SANDOYNNI**
Gisti á Mýruni í Húsavík, vanligir hentleikar t.d. brúsa. Sera vakurt útsýni, bilin til dyrnar.
Tlf. 318037

**FRÍTÍÐARINNIVIST!**
Vælhildin hús við øllum hentleikum í friðarligum umhvørvi í Hósvík verða útleigað til frítíðarhald.
Tlf. 422292 - 422430 (fax)
E-mail:
thala@post.olivant.fo

**GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIU**
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv. Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 313423, 316505, 284705

**HJÁLP!**
Mær manglar ein at deila íbúð saman við. Tú mást vera einlig, ordilig og álítandi. Húsaleigan er uml. 2.000,- um mánaðin.
Ring á 217686

**HJÁLP!**
Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. juli ella 1. aug.
Tlf. 332848

**HÚS ELLA KJALLARI YNSKIST**
Hús ynskjast til leigu við møguligum keypi seinni fyri eyga til hjún av bygd. Vit kunnu tosa um leigu og møguligan keypssáttmála. Óinnrættað hús ella kjallari hevur eisini áhuga.
Tlf. 361435

**HÚS TIL SØLU Í SKOPUN**
Húsini eru uml. 100 fermetrar í tveimum hæddum, báðar hæddirnar eru innrættaðar. Prísur 400.000 kr.
Thomas J. Kjærbo,
tlf. 225005

# Bústaðarveiðan

**Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðanfyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til ogn tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.**
**Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.**

**Nr. 860**
**Stað:** Tórshavn
**Slag av veiðu:** Íbúð helst Berjabrekku
**Stødd:** Egna til eitt fólk
**Kostnaður:** Einki krav

**Nr. 861**
**Stað:** Tórshavnar kommunu
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Uml. 100 m²
**Kostnaður:** Einki krav

**Nr. 862**
**Stað:** Tórshavn (eysturbýnum)
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Uml. 120-140 m²
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.400.000,-

**Nr. 864**
**Stað:** Tórshavn (eysturbýnum), Hoydalar ella Hoyvík
**Slag av veiðu:** Sethús við kjallara
**Stødd:** 120 m² ella størri
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 2.000.000,-

**Nr. 865**
**Stað:** Fámjin, Vági ella Froðba
**Slag av veiðu:** Gomul lítil hús við jørð (seyðafrælsum)
**Stødd:** Einki krav
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 200.000,-

**Nr. 867**
**Stað:** Tórshavn (Heygnum Mikla/Úti á Fløtum)
**Slag av veiðu:** Sethús ella tvíhús
**Stødd:** Einki krav
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.300.000,-

**Nr. 868**
**Stað:** Tórshavn (Helst nær miðbýnum)
**Slag av veiðu:** Sethús ella tvíhús (møguliga við hava)
**Stødd:** Egnað til familju við trimum børnum
**Ynskir:** Kunnu sjálvi gera ábøtur um neyðugt
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

**Nr. 869**
**Stað:** Leynar ella Stykkinum
**Slag av veiðu:** Helst gomul Føroysk hús (Um er: grundøki ella lítil íbúð í býti)
**Stødd:** Einki krav
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 600.000,-

**Nr. 870**
**Stað:** Helst Argir
**Slag av veiðu:** Sethús ella tvíhús
**Stødd:** Egna til familju við 3 børnum
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.200.000,-

### Grundøki

**Nr. 839**
**Stað:** Tórshavn, Argir ella Hoyvík
**Slag:** Iðnaðarøki
**Stødd:** Uml. 500 til 2000 m²
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 700.000,-

**Nr. 858**
**Stað:** Tórshavn (helst við Dalavegin)
**Slag av veiðu:** Grundøki
**Stødd:** Uml. 400 til 600 m²
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 370.000,-

**Nr. 863**
**Stað:** Tórshavn (eysturbýnum)
**Slag av veiðu:** Grundøki
**Stødd:** Uml. 500 m²
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 500.000,-

**Húsamekling Sp/f Protek,**
**Vagliið • Box 331 • 110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321 • Fax 319331**
**E-mail: protek@post.olivant.fo**
**Avgreiðsla kl. 10-12 og 13-16.**
**Keyp og søla av fastari ogn**

**HÚS YNSKIST**
Familja, tvey vaksin og tvey børn, søkja eftir húsi í Havn til leigu sum skjótast. Alt hevur áhuga.
Tlf. 313238, e. kl. 18

**HÚS YNSKIST**
til leigu í Vestmanna skjótast gjørligt.
Tlf. 213811

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST**
Vit eru ein familja við trimum børnum, sum søkja eftir húsi/íbúð á Glyvrum ella Runavík skjótast gjørligt áðrenn skúlin byrjar aftur.
Tlf. 422027

**HØLI TIL LEIGU**
til skrivstovu ella forrætning (fyrr FC Búðin )umleið 100 kvm.
Tlf. 315438

**ÍBÚÐ**
ella stórt kamar ynskist til leigu í Havn.
Tlf. 0045 21452502

**Í SANDOYNNA AT FERÐAST!!!**
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru vælegnað til bólkar. Nærri frættist á
tlf. 361417 - 361334

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST**
Tilkomin hjún ynskja hús/íbúð í Tórshavnar kommunu til leigu sum skjótast. Eru friðarlig og fara væl um.
Tlf. 447067

**ÍBÚÐ Á FREDERIKSBERG TIL**
leigu. Talan er um eina hugnaliga íbúð uppá 94 kvm., sum liggur tætt við sjógvarnar. Íbúðin hevur tvey kømur, stovu og køk umframt eina gongd og baðirúm. Íbúðin er partvíst møblerað. Vælegnað til familju ella tvey pør. Áhugaði kunnu ringja
á tlf. 318917

**ÍBÚÐ Á OYRASUNDS-KOLLEGIINUM**
2 verilsis íbúð, egið bað, felags køk, til leigu frá 1.7. til 1.8. fyri 2.200 kr.
Tlf. 375273

**ÍBÚÐ Í KBH.**
Tvey rúms íbúð við Fælledparken/Ríkissjúkrahúsið til leigu fram til 20.08.00. Hevur allar hentleikar.
Tlf. 421732

**ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN**
3 rúms íbúð, 2 altanir tætt við ráðhúspl. 10 min. til strondina til leigu 22. juli til 11. august.
Tlf. 0045 26227471
ella 0045 32967471

**SUMMARFRÍ Í KPH.**
Íbúð til leigu frá 1. juli til 13. aug. Sera gott buss- og toksamband. 10 min. inn á Ráðhúsplássið.
Tlf. 312070 ella 0045 36179352

**ÍBÚÐ Í ÅLBORG**
til leigu frá 15. aug. til 15. febr. 35 fermetrar við køki og bað. Er partvís møblerað og dentur verður lagdur á at tað verður væl hildið. Stutt er til býin og universitetið.
Tlf. 373940

**ÍBÚÐ Í ÅRHUS**
Sjúkrasystir, ið skal byrja á DSH, ynskir at framleiga verilsi ella íbúð frá 1. sept. 2000 til hálvan juli 2001. Vinarliga ring
Tlf. 318363 - 218363
e-mail:
jp_stat@post.olivant.fo

**ÍBÚÐ SØKIST**
Mamma við 3 ára gamlari gentu søkir íbúð í Havn, Argum ella Hoyvík skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 317976
teldupostur:
missalda@yahoo.com

**SUMMARHÚS**
í Skálavík til leigu í vikuskiftunum. Gott útsýni.
Tlf. 361217

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Eg eri ein ung genta, ið søki eftir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Eg eri 22 ára gomul og havi fast arbeiði.
Tlf. 316373 og 220705

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Vit eru eitt ungt og friðarligt par, sum søkja eftir íbúð í Havn frá 1. aug. vegna skúlagongd. Vit fara væl um og hvørki drekka ella roykja.
Tlf. 457096

**KAMAR ELLA ÍBÚÐ**
24 ára gamal, trúgvandi drongur ynskir kamar ella íbúð til leigu í Havn.
Tlf. 221291
ella 447700

**KEYPMANNAHAVN**
Politiaspirantur søkir íbúð til leigu ella keyps sum skjótast.
Tlf. 220646 ella 311116

**KEYPMANNAHAVN**
Politiaspirantur søkir íbúð til leigu ella keyps sum skjótast.
Tlf. 220646
ella 311116

**NÝMÓTANS ÍBÚÐ**
Stór nýmótans íbúð við øllum hentleikum so sum vaskimaskina, uppvaskimaskina, køli- frystiskáp, bryggers og hjallur. Góð beligginheit við útsýni yvir keiina og Nólsoyarfjørð. Liggur nær við miðbýin, til leigu frá hálvum juli evt. 1. juli. Leiga 5000 kr. um mánaðin excl. ljós og hita. Dep. 3 mánaðir.
Tlf. og fax 0045 86125554

**SUMMARHÚS Í HÚSAVÍK**
til leigu. Standa tætt við strondina. Útsýn yvir alla bygdina.
Tlf. 455565

**SUMMARHÚS Í KUNOY**
til leigu.
Tlf. 456247, kl. 17-18

**TIL LEIGU**
Verilsi, væl egnað til teknistovu, skrivstovu ella líknandi virksemi, til leigu.
Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 115

**TIL SØLU**
Hús við kjallaraíbúð á Marknagilsvegi til sølu, um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 319528, e. kl. 18

**TIL SØLU**
Motorur til Nissan Bluebird T 12 2.0 LX, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222630 - 422358